# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Kalda kríggið umaftur?

Tey, sum eru komin eitt sindur til árs, minnast Kalda kríggið. Hetta var ein sera spent støða millum NATO-lond øðrumegin og Warzawasamgongu hinumegin. Risaveldini USA og Sovjet vóru á odda í hesum stríði, sum sjálvsagt ikki var eitt beinleiðis kríggj við vápnum, men ein politisk støða, har óttin fyri álopi og fyrireiking til álop eyðkendi gerandisdagin. Tey blóðugu kríggj, sum vóru hetta tíðarskeiðið vóru tó meira ella minni avleidd av Kalda krígnum, og stórveldini tóku meira ella minni beinleiðis lut í hesum kríggjum. Nevnast kunnu Koreakríggið, Vietnamkríggið og øll tey mongu hjálandakríggini í fimmti og sektiárunum.

Kalda kríggið ávirkaði alt – búskap, samfelagslív og mentanarlív fyri vestan so væl sum fyri eystan. Eisini her í Føroyum bar Kalda kríggið við, og tað var ikki frítt, at krígsóttin ávirkaði gerandisdagin í Føroyum, serstakliga í fimmtiárunum. Tær almennu frágreiðingar, sum eru til taks um Danmark, Grønland og Føroyar undir Kalda krígnum avdúka, at eisini reint hernaðarliga og politiskt høvdu Føroyar týdning, serstakliga fyri NATO. Men eisini Warzawasamgongan hevði eyguni vend móti okkara landi, og alt bendir á, at var orrustan brostin á, ja, so vóru Føroyar vorðnar bumbumál orsakað av hernaðarligu útgerðini í Mjørkadali og á Eiði.

Eftir at Múrurin og Warzawasamgongan vóru fallin, tiðnaði Kalda kríggið burtur, spenningurin í heiminum linkaði, og óttin fyri einum heimsfevnandi atombardaga hvarv. Ábyrgdin fyri at halda hesa friðarligu javnvág liggur fyrst og fremst á USA. Undir Clinton stjórnini eydnaðist hetta væl, tí USA og NATO dugdu sær hógv og ansaðu eftir ikki at eyðmýkja tað Rusland, sum reisti seg úr politisku toftunum av Sovjetsamveldinum. Men eftir at tær neokonservativu kreftirnar við George W. Bush komu til valdið í USA er gingið aftur um brekkur við heimsfriðinum. USA hevur støðugt trýst og hótt Rusland, eitt nú við at gera rakettstøðir í Póllandi og Tjekkia. Putin stýrið í Ruslandi hevur hjalpt væl til, og Medvedev tykist fylgja sínum politiska mentori. Úrslitið er ein heimsstøða, sum kann minna á Kalda kríggið. Tað er henda støða, sum so at siga kemur í útbrot í Georgia, har Putin og Medvedev nýta loysingina hjá Abkasia og Suðurossetia til at vísa NATO, USA og ES, at Rusland aftur er við at gerast eitt stórveldi, sum Vesturheimurin noyðist at virða og at rokna við. Tað er væl skiljandi, at USA, ES og NATO vilja vísa styrki, tá Rusland fer fram við óspektum og harðskapi í sínum grannaøkjum. Hinvegin hevur USA hjálpt væl til við rakettstøðunum í túni Ruslands. Soleiðis byrjar ein tilgongd, ein skrúva uttan enda, sum kann leiða til eitt nýtt kalt kríggj, sum ongum gagnar uttan vápnaídnaðinum og viðgongdum kreftum fyri vestan so væl sum fyri eystan.

**Sosialurin**

# Tey gudleysu

SONNI JACOBSEN



Seinastu dagarnar er evnið um gudloysi vorðið meira aktuelt, enn tað kanska hevur verið áður. Sjálvsagt vegna tað, at tey sum ikki trúgva á annað enn seg sjálvan og sítt egna vit og megi, um man so kann siga, hava stovnað serstakan felagsskap. Og tey hava sín fulla rætt til tað.

Tað at trúgva ella ikki trúgva á ein skapara, eina hægri makt, ella "at mangt er millum himmal og jørð", er kanska út við líka gamalt sum menniskja. Tey mongu trúgva, at ting eru, sum ikki eru av hesum heimi, men úr einum øðrum heimi og úr eini aðrari dimensjón – himmalin og andaheimurin. Og tey fáu gera tað ikki.

Persónliga haldi eg, at tað skal ein "turkatrúgv" til at trúgva, at alt bara er komið av ongum. Helst størsti kristnilærarin nakrantíð – eftir Kristus sjálvan, Paulus ápostul, sigur, at skaparaverkið sjálvt vitnar um sín skapara. Og vit kundu lagt afturat, tann, sum ikki sær hetta er bæði blindur, deyvur og dølskur.

Eitt einasta dømi úr milliónum (og eg tími ikki at kjakast um hetta eina dømi seinni – hugsað bara um tað.) Blómur, sum eingi eygu hava, eru sum hava skap og lit av insektum, fyri at fáa hann-insektirnar av hesum slagnum at seta seg á seg og harvið føra dust millum blómurnar. Er hetta komið av tilvild? Hvussu kann hendan blóman, við ongum eygum og ongum heila, vita hvussu ein insekt sær út og enn meira skapa seg sjálva eftir henni? Og hetta er sum sagt bara eitt av ótalligum dømum. Jú, sanniliga, sjálvt tað minsta sindrið í skaparaverkinum vitnar um sín skapara. Sum eg segði: tað skal ein "turkatrúgv" til at trúgva, at alt bara er komið av ongum.

Nú nevndi mín góði vinur John Myllhamar í grein, at grundin til at fólk, sum áður hava verið kristin og sum venda trúnni bakið, helst gera hetta, tí tey hava verið heft at víttgangandi trúarbólkum. Nú kenni eg ikki persónliga nakran trúarbólk í Føroyum, sum lovar meira viðv. leking enn Jesus Kristus sjálvur lovar í sínum orði. Júst innan trúarbólkar har lekidómur verður boðaður í Jesu navni, skuldi verið minst grund fyri, at ein gjørdist ateistur. Sjálvt um ikki øll verða lekt, so verða altíð mong lekt og mangan á ófatiligan og undurfullan hátt. Tað havi eg sjálvur og mong við mær sæð mong dømi um. Og tað er jú ein váttan um, at Gud er! At onkur, sum ikki verður lektur, kann gerast beiskur er ein onnur søk. At ikki øll verða lekt, skuldi bara lært okkum eyðmýkt, tað eru ikki vit, men Gud sum ger verkið. Tó ferð eingin tómhentur og uttan troyst frá Jesusi. At mong verða lekt lærir okkum hinvegin, at Gud er við! Tí, sum mong søgdu á Jesu og á ápostlanna døgum: "hvør kann gera slík verk, um Gud ikki er við?" Ja, hvør kann biðja fyri menniskjum, og tey verða lekt, um Gud ikki er við?

Sigur ein, sum hevur sæð slíkar Guds vitnisburðar, seg vera ateist, av hvørji orsøk tað so er, so er hann ein lygnari, tí hann veit betur.

Eg skal geva teimum rætt, sum siga, at ein sannførdur ateistur ella gudloysingur er eingin vandi fyri kristnu trúnna. Tá ápostlarnir fóru út við gleðiboðskapinum var 100% av heiminum gudloysingar – við andans kraft og megi sigraðu teir. Og verkið heldur áfram tann dag í dag.

Ein sum er "kaldur" kann altíð verða sannførdur og gerast "heitur", gevur Gud honum náði til tað. Jesus sigur, at tey, sum andin dregur, koma til hansara. Okkara uppgáva er at biðja, vitna og boða orðið, restin er upp til Gud, og tøkk fái Gud fyri tað. At sannføra hjørtuni dugir Hann nógvar ferð betur enn vit. Og tað er andans uppgáva: at sannføra heimin um synd og um rættvísi og um dóm. (Jóh. 16.8.)

# Um pensjón!

GUNNA THOMSEN

**Viðmerking til bræv hjá Mortan Rasmussen í Dimmalætting 26.8.08.**

Trupulleikin, sum Mortan Rasmussen beskrivar viðvíkjandi sínari pensjón, er sami trupulleikin, sum allir føroyskir pensjónistar hava, sum eru limir í donskum pensjónskassa.

Tá mín pensjónstíð nærkaðist, vendi eg mær til mín pensjónskassa, sum sorterar undir Økonomistyrelsen, Landegreven 4. Eg fekk svar beinanvegin og fekk at vita, hvat eg fekk í pensjón.

Tá so tann tíðin kemur, at eg skal pensjónerast, søkti eg Almannastovuna um at fáa fólkapensjón. Eg fekk 3.313.13 kr. tá eg so fái ta donsku pesjónina, er hon reducerað við 2.300 kr. Eg kannaði málið bæði her og der, men kundi ikki fáa nakra fornuftiga forkláring. Ministarin í almannamálum kundi ikki koma við svari. Eg ringdi til Føroya landsstýri og tosaði við nógv klók høvd har og onki reelt svar, eg tosaði við Almannastovuna, sama resultat.

Men so ein dag, kom eg í samband við eitt klókt høvd tilfeldiga á gøtuni, sum fortaldi mær, at í 1993 var lóg komin í gildi viðvíkjandi »samordningsfradrag« - á føroyskum kalla samskipanarfrádráttur. Lógin er føroysk, ikki donsk. Hesin frádráttur er 2% pr. pensjónsár og skal trekkjast frá fólkapensjónini. Hevur tú ein pensjónsaldur uppá 35 ár, so verða 2x35=70 trekt frá kr. 3.313,- T.v.s. 70% av 3.313=2.319. Eftir eru 813,90 kr.

Hesar 2.319,10 kr. verða nú trektar av míni donsku pensjón, men eg fái 3.313,- kr. í fólkapensjón og hon er skattafrí, men ikki restin av pensjónini. Hendan lógin er bert galdandi fyri pensjónistar, sum búgva í Føroyum. Flytir tú til Danmarkar, fært tú 2.319,10 kr. lagdar til donsku pensjónina, og hartil fært tú danska fólkapensjón.

Eg eftirlýsi eina frágreiðing frá politiska myndugleikanum. Ein fornuftig forkláring má væl finnast.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13$^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.